# Fótbólturin ger Føroyar kendar í Týsklandi

**Føroyska ferðavinnan væntar sær nógv av fótbóltsdystunum millum Føroyar og Týskland. Í hesum sambandi var Allan Simonsen trekkplástur á ferðavinnustevnu í Berlin herfyri. Hann er kendur har, og spældi hann fyri München Gladbach, tá hann í 1977 varð kosin ársins fótbóltsleikari í Evropa**



*Føroyska umboðanin á ferðavinnustevnuni ITB í Berlin:*
***Frá vinstru:** Annika Andreasen, Smyril Line, Kent L. Christensen, Atlantic Airways, Ann Mari Vang, Smyril Line, Allan Simonsen, fyrrverandi landsliðsvenjari, Urd Johannesen, Ferðaráð Føroya og Magni Arge, Atlantic Airways.*

FERÐAVINNA
*Eirikur Lindenskov*

Týskarar eru farnir sýna Føroyum stóran áhuga, síðani Føroyar og Týskland komu í sama bólk í europeisku fótbóltskappingini. Føroyingar hava í mong ár havt sín egna bás á stóru týsku ferðavinnustevnuni ITB í Berlin. Í ár høvdu Atlantic Airways, Smyril Line og Ferðaráð Føroya bjóðað Allan Simonsen við sum »trekkplástur«. Allan er væl kendur í Týsklandi, har hann spældi fyri München-Gladbach í mong ár – eisini í 1977, tá hann varð kosin besti leikari í Evropa.

Førosyka ferðavinnan sigur frá stórum áhuga í Týsklandi, og á stevnuni í Týsklandi er lagt upp til, at Føroyar skulu seta týska marknaðin í fokus komandi tvey árini. Ætlanir eru frammi um at skipa fyri blaðmannavitjanum í Føroyum, víðka samstarv við týskar ferðavinnufyritøkur, seta í verk serlig tiltøk (road show) í Týsklandi saman við íslendingum og grønlendingum í heyst o.s..fr.

– Vit fáa ongantíð aftur slíkan møguleika at gera vart við Føroyar í Týsklandi, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

– Vit hava skyldu til at gera sum best burturúr hesum høvinum at gera vart við Føroyar – og vit hava longu sett fleiri tiltøk í gongd sigur hann.

Magni Arge sigur, at tey í Atlantic Airways eru errin um teirra støðu sum høvuðsstuðul hjá fótbóltslandsliðnum, tí landsliðið hevur veruliga sett Føroyar á heimskortið. Tað stendur sína roynd í Týsklandi í dag, har fólk í ferðavinnuni rokna við, at um 50 milliónir týskarar fáa kunnleika til Føroyar umvegis fótbóltin, meðan tey í dag bert eru fá, ið hava kunnleika til lítla landið í Norðuratlantshavið.

Men gongur tað sum ferðavinnan í Føroyum ynskir, so síggja vit hópin av týskarum í Føroyum komandi árini, sigur Magni Arge.



*Allan Simonsen, fyrrverandi landsliðsvenjari, og Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways, hittast á ferðavinnustevnuni ITB í Berlin. Teir kennast væl frá fótbóltinum og mongum ferðum kring í Europa og hav eisini sama føðingardag.*

## Sjálvstýrislistin í Norðoyggjum liðugur

Norðoya Sjálvstýrisfelag er liðugt við listan til løgtingsvalið 30. apríl. Listin sær soleiðis út:

Frida Christiansen, arbeiðskvinna, Klaksvík
Gullborg Christiansen, handilskvinna Norðdepil
Eyðun Eltør, landsstýrismaður, Klaksvík
Jan Gardar, deildarleiðari, Klaksvík
Karl Heri Joensen, býráðslimur, Klaksvík
Jon Leivsgarð, skipsførari, Klaksvík
Petur Martin Solmunde, portørur, Klaksvík





Á aðalfundi 5. apríl verður lagt fram uppskot um at skipa Føroya Sparikassa sum partafelag.

Tekna teg sum ábyrgdara í Føroya Sparikassa innan 5. apríl 2002. So fært tú møguleikan at gerast partaeigari í Føroya Sparikassa P/F.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo





Óhoyrt! Páskatilboð

4% føst renta

Fígging av brúktum bili hjá

Bilfríðkan

www.bilfridkan.fo


Svartkjafturin:

# Noreg fær svartaper

**Í grein í Intrafish stendur at lesa, at Fiskebåtredernes Forbund í Noreg illneitast inn á treiskir íslendingar og føroyingar, ið siga, at Noreg skal minka um svartkjaftaveiðuna í ár.**

SVARTKJAFTUR

Deildarleiðarin í Fiskebåtredernes Forbund, Paul-Gustav Remøy sigur, at pástandirnir um, at Noreg nú er einasta tjóðin, sum leggur trýst á svartkjaftaveiðuna, er ein roynd í at fáa fjølmiðlarnar at vakna.

Remøy sigur, at tað er ein sannroynd, at Noreg hevur minkað um kvoturnar frá í fjør til í ár við umleið 100.000 tonsum. Bara í EU er minkingin frá 190.000 tons til 120.000 tons, sigur deildarleiðarin. Paul-Gustav Remoy heldur, at Noreg nú vegna treiskleika situr eftir við svartaperi í sambandi við svartkjaftaveiðuna, meðan veruleikin um, hvør fiskar mest er ein heilt annar.

Í blaðnum stendur eisini, at føroysku myndugleikarnir hava enn ikki sagt, hvussu nógv skal fiskast undir Føroyum í ár. Men henda kvotan verður framhaldandi 360.000 tons.

*-ib*





BOÐTÆNASTAN
FØROYATELE